




# Reign of Fire - Dragejægerne

heimurin 2020. Flogdrekar hava yvirtikið valdið í heiminum, teir liva fyri at drepa og njóta øskuna av tí, teir brenna. Allur heimurin og heimsins stóru býir eru lagdir í oyði. Men eitt stað, á eini gamlari borg nakað norðarlaga í Onglandi, roynir Quinn at halda lív í einum lítlum samfelag, hóast korini eru sera vánalig. Sum smádrongur var Quinn tann fyrsti, sum bar eyga við drekarnar, sum eftir fleiri ára túsund í dvala vóru vaktir til lívs aftur, tá tunnlar vóru boraðir undir London. Lítla samfelagið hjá Quinn klárar so dánt at hóra undan, og hugsingur er ikki um at berjast móti drekunum – ikki fyrr enn amerikanarin Danton Van Zan og hansara fólk, sum eru drekaveiðimenn, ein dagin koma framvið. Nú skal bardagin móti drekunum byrja, so sivilisatiónin kann bjargast!



Og tað er júst hetta, sum filmurin Reign of Fire, ið hevur fingið danska heitið Dragejægerne, snýr seg um – at bjarga sivilisitatiónini. Ein uppgáva, ið kann tykjast ómøgulig, hóast framkomnu útgerðina hjá Van Zan og hansara fólki, tí drekarnir eru í túsundatali. Eftir eitt langt brot í filminum, har Van Zan og hansara fólk við tógvi stríð taka lívið av einum dreka – sjálvandi við hjálp frá Quinn, verður ein loysn funnin. Tað vísir seg, at allir drekarnir eru av kvennkyni, og at tað bara finst ein dreki av kallkyni, sum gitir øll eggini hjá teimum. Við at drepa kallkynsdrekan, sum annars er øðiligur til støddar, vilja allir drekarnir sum frálíður doyggja út. Kallkynsdrekin heldur til í leivdunum av London, har endaliga uppgerðin til seinast í filminum eisini fer fram.

Søgan kann tykjast rættuliga banal og heldur ikki teldugjørdu drekarnir og onnur »special effects« megna at bera filmin. Tað eru jú longu nógv ár síðan Jurassic Park fyrstu ferð var á løriftinum, og drekarnir í Reign of Fire eru í so máta einki upplivilsi. Tó er nakað av spenningi at hóma í brotinum, har Van Zan og hini skulu drepa ein av drekunum.

Høvuðspersónarnir kunnu til tíðir tykjast eitt sindur láturligir. Serliga Van Zan, spældur av Matthew McConaughey, sum alla tíðina gongur stynjandi runt við ørmunum ein hálvan metur út frá lendunum, meðan hann sum oftast eisini tyggir ein sigarstubba.

Og sjálvandi hevur hann eisini amerikanska flaggið seymað á bringuna í hernaðarvestinum hjá sær. Replikkirnir millum Van Zan og Quinn eru heldur ikki teir djúpastu – men okey, talan er jú ikki um ein psykologiskan thrillara, men ein banalan science fiction film um at drepa nakrar stórar, óndar flúgvidrekar, sum spýta eld. Eitt skifti í filminum óttast tú at leikstjórin traðkar í djúpastu grøvina og letur tað renna saman millum Quinn og kvinnuliga tyrluflogskiparan hjá Van Zan, nevnd Alex. Hetta verða vit til alla lukku skónað fyri - og tó, tá sivilisitatiónin er bjargað, eru Quinn og Alex framvegis saman…

## Fakta um Reign of Fire

**Leikarar:** Christian Bale, Matthew McConaughey, Izabella Scorupco
**Leikstjóri:** Rob Bowman
**Longd:** 102 min.
**Stað:** Havnar Bio, um tú ert 12 ár ella eldri

## Ung orð: Súkklan við hjálpimotori

tey seinastu árini hevur hann verið alt meir at sæð. Í dag er hann ein heilt vanligur partur av býarmyndini – kanska serliga í Havn. Hetta kemst kanska serliga av tí, at ung frá 16 ára aldri hava loyvi at koyra hann.

Skutarin ger tað møguligt hjá ungum at koma til støð, ið ikki liggja í nærumhvørvinum, uttan at vera bundin at t.d. foreldrum við bili. Ógvuliga nógv tíð er at spara við at nýta skutaran. Tú kanst koma og fara, sum tær lystir, og hetta ger teg óheftan ella frælsan.

Ein vanligur, nýggjur skutari kostar umleið 20.000 kr, hevur uml. 5 hk og koyrir eini 50-60 km/t. Tað kann ikki sigast at vera ov lítil ferð, tá hugsað verður um, at hann mest verður nýttur til at koyra inni í býnum, har mest loyvda ferðin er 50 km/t. Tað er tí náttúrligt av okkum at halda, at skutarar ikki koyra ólógliga, tá vit dagliga síggja teir ferðast við ferðslustreyminum í b?num. Men um vit halda ta?, fara vit skeiv. Lógin sigur, at ein skutari bert kann koyra 30 km/t. Um hann hevur møguleika at koyra skjótari enn hetta, er hann ólógligur.

Tað er løgið at hugsa sær, at ein „óvitandi" unglingi, sum hevur keypt sær ein skutara og fingið koyrikortið, sum loyvir honum at koyra hann, hóast alt kann verða tikin av politinum, fáa eina bót fyri at koyra ein ólógligan skutara og verða noyddur at ganga heim, av tí at



politiið hevur tikið skutaran. Drongurin fær hann tó aftur. Hann er sum so eisini heilskapaður, burtursæð frá tí, at ein lítil lutur er tikin burtur, og at motorurin kemur sum eitt samlisett, í einum posa. Hetta má drongurin gjalda fyri at fáa 'samlað'.

Allar flestu skutararnir, sum ung koyra á, um ikki allir, kunnu koyra meir enn 30 km/t og eru tí ólógligir. Um politiið hevði tikið allar, so hevði trupulleikin við lógarbrotunum verið loystur. Men hetta er av ymsum orsøkum ógjørligt. Heldur ikki burdu vit hækkað ferðarhámarkið, so at skutararnir eru lógligir, tí tað er væl skilligt. Koyriførleikarni hjá 16 ára gomlum eru verri enn teir hjá bilførarunum, og tey eiga tí ikki at hava loyvi at koyra eins skjótt og teir.

Tað, sum undrar meg mest viðvíkjandi ólógligum skutarum, er, at skutarar, sum koyra skjótari, enn tey ungu hava loyvi at koyra, verða seldir temum ungu. Teimum, sum selja skutararnar, kunnu vit ikki steðga, tí vit kunnu lata vera við at keypa teir, um vit ikki vilja hava teir. Vit hava ábyrgdina. Men er tað nú trygt at geva 16 ára gomlum slíka ábyrgd? Vilja dreingir ikki koyra so skjótt sum gjørligt, uttan at teir hugsa um fylgjurnar?

**Bjarni**